# að – og tað fjórða fyllir 100 í juni!



køkur, men hetta var ov lítið, og tí varð neyðugt at seta tvey borð upp aftrat.

Tá ið saman um kom, sótu tilsamans 217 fólk til borðs.

## Hugnalig løta

Á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi siga tey, at hetta var ein sera hugnalig og væleydnað løta, har fleiri góðar røður vórðu hildnar.

Tað var Tordur J. Niclasen, leiðari, sum vegna stovnin beyð vælkomin. Síðan tók sonur, Karin, Charles Fríðberg yvir og greiddi frá, hvussu borðhaldið fór at verða skipað.

Familjan hjá Karini hevði gjørt eitt fitt sanghefti við sálmum, sangum og áhugaverdum myndum, sum lýsa ein part av lívinum hjá Karini og familju hennara.

Tað var Bjarni Djurholm, varaløgmaður, sum legði fyri, og á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi siga tey, at varaløgmaður helt eina sera vakra røðu, har hann bæði var persónligur og menniskjansligur, sum tey taka til.

Petra J. Joensen, stjóri á Almannastovuni segði eisini nøkur orð og handaði Karini eina gávu á 4.000 krónur, sum Almannastovan letur fólki, ið náa slíkar føðingardagar.

Tordur J. Niclasen bar føðingardagsbarninum eina heilsu, og tá ið hann var komin til endans av síni røðu, boðaði hann vegna starvsfólkið frá, at tey høvdu yrkt ein sang til Karina í samband við høvið.

Borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Sigurd Simonsen, heilsaði eisini bygdarkonuni við eini góðari og áhugaverdari røðu.

Eins og Charles Fríðberg, sonur Karin, hevði røðu, bar eisini Karin Toftegaard, sum er ommudóttir føðingardagsbarnið, fram eina frálíka røðu, sum var bæði álvarsom og stuttlig. Í røðuni greiddi Karin frá tí, sum hon mintist um ommu sína og heimið.

At enda takkaði Charles Fríðberg øllum, sum høvdu verið við til at gjørt føðingardagin hjá mammuni so hugnaligan og minnisríkan.

Á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi eru 46 búfólk, og haraftrat eru átta á Umlættingarheiminum í Syðrugøtu.

## Karin Joensen

Karin Joensen, fødd Eliasen, er sum nevnt ættað úr Fuglafirði, og foreldur hennara vóru Líggjas við Gjógvará og Katrina, fødd Toftegaard.

Tey vóru fimm systkin, tríggir dreingir og tvær gentur.

Hon giftist í 1934 við Eliasi Joensen av Skipanesi. Hann arbeiddi í mong ár sum snikkari hjá Jákupi Oluf Jacobsen í Fuglafirði.

Karin og Elias fingu trý børn, dóttrina Rigmor, gift Toftegaard og Kaj Eli Blábjørg, sum bæði búgva í Fuglafirði, og Charles Fríðberg, sum býr á Argjum.

Karin gjørdist einkja í 1989, tá Elias doyði, 80 ára gamal.

Síðan oktober 1996 hevur hon búð á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í Runavík.

Karin Joensen eigur 10 ommubørn og 18 langommubørn.



*Landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni, skrivar í gestabókina, nú bygdarkonan, Karin Joensen, fyllir 100 Mynd: Judith Johannessen*




*Vit plaga at siga, at tað er ikki á hvørjum degi, at fólk fylla 100, men á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi hava trý búfólk fylt 100 í ár*

*Mynd: Judith Johannessen*



*Á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi dekkaðu tey til 200 fólk, men tað rakk ikki til. Neyðugt var við tveimum borðum aftrat, soleiðis at 217 fólk sluppu til borðs*

*Mynd: Judith Johannesen*



*Á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi høvdu tey pyntað til dagin og kvinnurnar, sum búgva á heiminum, høvdu allar verið hjá »frisør« til dagin*

*Mynd: Judith Johannessen*